# FCK fekk fult og hinir einki

**Leikluturin hjá Toda Jónsson í kapprenningini um danska meistaraskapin var hóskvøldið uppaftur minni, enn hann hevur verið undanfarnu ferðirnar**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

*Todi Jónsson hitaði upp í 60 min. uttan at sleppa á vøllin*

**SOSIALURIN-KEYPMANNAHAVN:** FCK tók hóskvøldið eitt risa stig fram ímóti endurtøku av at vinna meistaraheitið. Samstundis var tað staðfest, at í lotuni hevur FCK venjarin ikki serligan hug at geva føroyska álopsspælaranum, Toda Jónsson, loyvi at vera á vøllinum.

Hóskvøldið vísti, at Todi Jónsson er fimti álopsspælarin. Zuma, sum er skaddur, og Álvaro Santos, sum við at vera einasti málskjúttin ímóti Brøndby, styrkti uppaftur meiri um sína støðu, er nummar tvey í røðini, og Jesper Bech, sum í útgangsstøðuni ímóti Brøndby, var í álopinum saman við Álvaro Santos, er nummar trý.

Síðstu ferðirnar hevur Hans Backe víst Peter Møller størri álit, enn hann hevur víst Toda Jónsson, og tað gjørdi hann orduliga hóskvøldið. Tá ið fyrra umfarið var knappliga hálvrunnið, fóru Todi Jónsson og Peter Møller at hita upp. Todi rann í meiri enn ein tíma aftur og fram frá miðstrikuni og ímóti baklinjuni, har Brøndby áskoðararnir sótu.

Tá ið miðvallarin í vinstru, Morten Bisgaard, orsakað av vøddaskaða noyddist at taka seg av vøllinum longu í 1. hálvleiki, varð Peter Møller skiftur inn í álopið, og Jesper Bech var fluttur aftur á miðvøllin. Todi kom ikki á vøllin, fyrrenn hann fór at ynskja liðfeløgunum tillukku við 1-0 sigrinum.

Er tað ikki stórt vónbrot ikki at sleppa á vøllin, men heldur at renna uttanfyri allar 90 minuttirnar?

Todi Jónsson:

– Eg kenni treytirnar, og eg havi sligið meg til tols við, at mín leiklutur restina av hesum kappingarárinum verður ikki millum teir fyrstu ellivu. Sum skiftisspælari vónar tú sjálvandi at sleppa á vøllin. Men tað nyttar einki at iðra seg um tað. Eg fegnist saman við liðfeløgunum um, at tað eydnaðist at vinna, og so eigi eg, sum allir hinir í FCK hópinum, at líta frameftir og vera klárur, um tað verður brúk fyri mær í Esbjerg sunnudagin.

Hvat sigur tú um tann dystin?

– At tað verður torfort. Fyri okkum kom tað sjálvandi væl við, at bæði Esbjerg og Brøndby taptu í kvøld. Møguleikin hjá Esbjerg er nú treytaður av, at teir fáa øll stigini ímóti okkum. Tí verður talan um stórt stríð sunnudagin, heldur Todi Jónsson. Hann er sáttmálabundin í FCK í eitt ár afturat, og hann hevur ongar ætlanir um at biðja um at verða loystur frá sáttmálanum, nú hann hevur havt torfort at sleppa upp í part.

– Eg haldi framvegis, at eg havi førleika at kappast við hinar spælararnar um plássini í FCK álopinum. Eg eri ikki enn so væl fyri, sum eg eigi at vera. Men aftaná summarfrítíðina verður tað vónandi, sum tað eigur at vera, og eg veit við meg sjálvan, at so eigur tað at bera til at vera við.

### Sum so ofta áður

Tá ið finaludystir eru í Europa Cup og í eitt nú eingilsku steypakappingini, so vísir tað seg ofta at vera soleiðis, at fótbóltsspælið er stóri taparin. Nervarnir og týdningurin av tí eina málinum hava ofta við sær, at tað verður lagdur serliga stórur dentur á verjupartin og ikki at gera mistøk. Soleiðis var tað eisini hóskvøldið, har 41.005 áskoðarar, sum er nýtt met í superliguni, gjørdu karmin altjóða kendan.

FCK fekk yvirhøvur ikki glið á spælið í fyrra hálvleiki. Brøndby spælararnir sótu tætt í teimum, og tá ið FCK verjan og miðvøllurin royndu við longum sendingum fram til Álvaro og Jesper Bech, spurdist ikki tað stóra burturúr. Brøndby hevði betri tak á spælinum, og tað lá í luftini, at um nakað mál fór at koma, so fóru teir at fáa tað.

Brøndby fekk einki mál, og tá ið FCK tiðliga í 2. hálvleiki skoraði, vóru teir í Brøndby ikki førir fyri at svara aftur. FCK hevði yvirvág, og tað var tættari 2-0, enn Brøndby útjavnandi máli.

Miðvallarin í høgru, Michael Silberbauer, var meistari aftanfyri málið. Á miðjuni vann hann bóltin frá vinstra verjumanninum hjá Brøndby, Asbjørn Sennels, sum frammanfyri Morten Olsen spældi fyri at sleppa upp í part í EM hópinum. Silberbauer setti ferð á, slepti nett í røttu løtuni eitt sindur til vinstru til Peter Møller, sum einum bokksspælara líkur, fokuseraði upp á málið. Møller smekkaði til, men hann rakti ikki, sum hann hevði ætlað. Tíbetur fyri hann og FCK, so var Álvaro Santos klárur við handara stólpan, og skuldi bara stýra bóltinum síðsta teinin inn um strikuna.

Ein øgiligur fagnaður um mesta partin av Parkini. Aftanfyri annað málið tagnaðu tiltiknu gulu og bláu áskoðararnir. Michael Laudrup gav sínum monnum boð um at spenna álopsbogan so nógv, sum tað bar til. Men einki bar til. FCK miðverjan var tøtt, og meistaraskapurin er eftir hóskvøldið nógv nærri FCK, enn hann var undan hóskvøldinum.

### Alt lagaði seg eftir vild

Í Parkini eru tvær veldugar talvur, sum vísa einstakar støður umaftur. Á hesum talvunum verða srtøður og úrslit í hinum dystunum eisini víst.

Hjá bæði Brøndby og FCK áskoðaruunum var fagnaðurin stórur, tá ið tað sást, at Herfølge hevði smurt Esbjerg av.

Í botninum er tað næstan avgjørt, at heiðurskrýnda AB næsta kappingarár skal spæla í næstbestu deildini. Uttan Jákup á Borg vann OB 3-1 í Gladsaxe á AB. Frem gjørdi sítt, tá ið teir vunnu 3-1 á Viborg, sum einki hevur at spæla fyri. Nú eru teir í Valby bara trý stig aftanfyri FCN og Herfølge. FCN greiddi málleysan javnleik á heimavølli ímóti steypafinalistunum úr AaB. Herfølge gjørdi sítt, tá ið teir vunnu á Esbjerg. Úrslitið var 3-1, eftir at Herfølge hevði verið frammanfyri 3-0. AGF tapti 5-2 í Herning, og harvið er AGF, sum í morgin fer at fáa vitjan av Frem, aftur í vanda fyri at flyta niður. Sunnudagin verður spælt soleiðis: AaB-Herfølge, Viborg-AB, Brøndby-FCM, OB-FCN, AGF-Frem og Esbjerg-FCK.

### Danska superligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK (M) | 30 | 18 - 7 - 5 | 49 | 24 | 25 | 61 |
| 2 | Esbjerg | 30 | 17 - 8 - 5 | 64 | 37 | 27 | 59 |
| 3 | Brøndby (S) | 30 | 17 - 7 - 6 | 48 | 26 | 22 | 58 |
| 4 | OB | 30 | 15 - 7 - 8 | 59 | 43 | 16 | 52 |
| 5 | AaB | 30 | 14 - 8 - 8 | 44 | 37 | 7 | 50 |
| 6 | FCM | 30 | 13 - 6 -11 | 61 | 45 | 16 | 45 |
| 7 | Viborg | 30 | 10 - 8 -12 | 43 | 40 | 3 | 38 |
| 8 | AGF | 30 | 10 - 3 -17 | 43 | 62 | -19 | 33 |
| 9 | Herfølge | 30 | 8 - 6 -16 | 31 | 45 | -14 | 30 |
| 10 | FC Nordsj. | 30 | 7 - 9 -14 | 31 | 53 | -22 | 30 |
| 11 | Frem | 30 | 8 - 3 -19 | 36 | 55 | -19 | 27 |
| 12 | AB | 30 | 6 - 2 -22 | 25 | 67 | -42 | 20 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jákup á Borg (OB)

### Danska 1. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Silkeborg | 24 | 17 - 4 - 3 | 53 | 17 | 36 | 55 |
| 2 | AC Horsens | 24 | 16 - 4 - 4 | 42 | 17 | 25 | 52 |
| 3 | Randers FC | 24 | 16 - 3 - 5 | 64 | 36 | 28 | 51 |
| 4 | Sønderjyske E | 24 | 14 - 5 - 5 | 62 | 33 | 29 | 47 |
| 5 | Køge | 24 | 13 - 6 - 5 | 46 | 33 | 13 | 45 |
| 6 | Skjold | 24 | 12 - 4 - 8 | 51 | 39 | 12 | 40 |
| 7 | Ølstykke | 24 | 11 - 3 -10 | 49 | 43 | 6 | 36 |
| 8 | Nykøbing | 24 | 11 - 3 -10 | 36 | 39 | -3 | 36 |
| 9 | FC Nordjylland | 24 | 8 - 7 - 9 | 28 | 35 | -7 | 31 |
| 10 | Fredericia | 24 | 7 - 9 - 8 | 31 | 34 | -3 | 30 |
| 11 | Fremad Amager | 24 | 6 - 6 -12 | 33 | 44 | -11 | 24 |
| 12 | B 93 | 24 | 5 - 7 -12 | 32 | 42 | -10 | 22 |
| 13 | Vejle | 24 | 5 - 6 -13 | 32 | 48 | -16 | 21 |
| 14 | Brønshøj | 24 | 5 - 6 -13 | 29 | 57 | -28 | 21 |
| 15 | FC Aarhus | 24 | 4 - 3 -17 | 22 | 56 | -34 | 15 |
| 16 | B 1913 | 24 | 1 - 6 -17 | 16 | 53 | -37 | 9 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen,(Vejle), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)



Skála-ÍF:

# Skálamenn ríða á aldukambinum

**Á Skála ætla teir sær at halda fram við góðu byrjanini upp á kappingarárið, nú uppflytararnir úr Fuglafirði koma á vitjan**

UPPTAKT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Skála hevur fingið eina sjáldsama góða byrjan upp á kappingarárið í ár. Fýra stig av seks møguligum aftaná tvey tey fyrstu leikumførini er óhoyrt hjá Skála í bestu deildini. Fyrst vunnu teir á føroyameistarunum úr HB á Skála, og í øðrum umfari fingu teir javnleik á útivølli móti VB.

### Liðskiparin leikbannaður

Heimaliðið hevur alt sítt fólk tøkt til dystin móti fuglfirðingum sunnudagin, og vónirnar eru góðar undan dystinum. Venjarin hjá Skála, Johan Nielsen, sigur, at teir fara at royna at halda fram við góðu byrjanini, og sjálvsagt fara teir eftir øllum trimum stigunum, hóast tað altið er trupult.

Fuglfirðingar hava næstan allar mans klárar til dystin sunnudagin. Einasta undantakið er liðskiparin, Eyðolvur Petersen, sum fekk reyða kortið í fjórðingsfinaluni móti KÍ seinasta vikuskifti, og sum tískil er leikbannaður til dystin sunnudagin. Høgni Zachariassen,ið hevur drigist við ein skaða í hondini, er við aftur í hópinum hjá ÍF, sum ætlar sær øll trý stigini heim við aftur av Skála.

**Støðan, 1. deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 2 | 2 - 0 - 0 | 5 | 2 | 3 | 6 |
| 2 | B36 | 2 | 1 - 1 - 0 | 6 | 2 | 4 | 4 |
| 3 | Skála | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 1 | 2 | 4 |
| 4 | KÍ | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 5 | ÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 6 | 5 | 1 | 3 |
| 6 | VB | 2 | 0 - 2 - 0 | 1 | 1 | 0 | 2 |
| 7 | NSÍ | 2 | 0 - 1 - 1 | 3 | 5 | -2 | 1 |
| 8 | HB | 2 | 0 - 1 - 1 | 1 | 3 | -2 | 1 |
| 9 | EB/ Streymur | 2 | 0 - 1 - 1 | 0 | 4 | -4 | 1 |
| 10 | B68 | 2 | 0 - 0 - 2 | 0 | 3 | -3 | 0 |

**Støðan, 2. deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FSV | 2 | 2 - 0 - 0 | 10 | 2 | 8 | 6 |
| 2 | TB | 2 | 2 - 0 - 0 | 8 | 3 | 5 | 6 |
| 3 | AB | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 4 | Royn | 2 | 1 - 0 - 1 | 7 | 4 | 3 | 3 |
| 5 | B36 | 2 | 1 - 0 - 1 | 3 | 3 | 0 | 3 |
| 6 | B71 | 2 | 1 - 0 - 1 | 4 | 7 | -3 | 3 |
| 7 | VB | 2 | 1 - 0 - 1 | 3 | 7 | -4 | 3 |
| 8 | KÍ | 2 | 0 - 1 - 1 | 3 | 4 | -1 | 1 |
| 9 | Sumba | 2 | 0 - 0 - 2 | 2 | 4 | -2 | 0 |
| 10 | LÍF | 2 | 0 - 0 - 2 | 0 | 7 | -7 | 0 |

# Bulgarskur áleypari til B68

Ein nýggjur spælari varð á Svangaskarði, tá 1. deild hjá B68 vandi í gjárkvøldið. Talan er um ein áleypara úr Bulgaria, sum í gjár kom við flogfarinum til Føroya.

Beint undan evstamarki fríggjadagin á døgverða var soljóðandi skriv at sígga á B68 heimasíðuni:

B68 hevur einki mál fingið tveir teir fyrstu landskappingardystirnar, og tí er neyðugt at gera álopið skarpari. Tað er ætlanin at 26 ára gamli Stanislav Valeriev Stankov úr Bulgaria skal gera. Og hagtølini hjá honum skuldu borgað fyri, at hann er førur fyri at skjóta nøkur mál. Í Bulgaria hevur hann spælt 98 dystir í bestu deildini og hann hevur skotið 46 mál. Í 2. deild hevur hann spælt 47 dystir og hevur skotið 29 mál.

Hann hevur til seinasta kappingarár spælt við so kendum liðum sum Levski Sofia og Lokomotiv Sofia. Ætlanin var, at hann í vetur skuldi til India at spæla í bestu deildini har, men hann tók ikki av sáttmálanum við indiska felagið. Tí hevur hann higartil í ár spælt sum áhugaleikari í einum 2. deildarfelag í heimlandinum. Har hevur hann spælt 23 dystir og skotið 15 mál.

Umframt at hava spælt sum áleypari, hevur Stanislav Valeriev Stankov viðhvørt spælt sum spælstýrari og hann hevur eisini víst góð evni á miðvøllinum. Tað er tó lítil ivi um, at B68 fer at brúka hann í álopinum um báðir partar eru nøgdir og sáttmáli verður gjørdur.

Stankov hevur spælt fleiri dystir bæði á U16 og U18 landsliðnum hjá Bulgaria.

B68-formaðurin Niclas Davidsen upplýsir, at bulgarin er komin til Føroya at vísa hvat hann dugur, og eru báðir partar samdir um at gera sáttmála, verður hann gjørdur so skjótt tey neyðugu loyvini eru fingin. Tó er greitt, at Stankov verður ikki við móti NSÍ nú sunnudagin.

Leikarin er komin til Føroya gjøgnum North Atlantic Football Agency við Jákup í Stórustovu.

# Rætting til FSV grein

Í viðtalu við fyrrverandi FS Vágar leikaran Bjarna Prior stendur í gjár at lesa í Sosialinum, at "so at siga allir leikararnir vilja umboða SÍF í landskappingini", um felagsliðið FS Vágar skuldið verið upployst. Hetta er ikki rætt, tí líkamikið hvat hendir, upplýsir Bjarni Prior, at leikararnir vilja umboða eitt felagslið, óansæð hvussu felagið kemur at eita. Leikararnir standa sostatt saman um felagsliðið í Vágunum.

# FS Vágar er ikki søga

VIÐMERKING

Tað er hugstoytt at frætta í fjølmiðlunum, at tað felagið, sum vit leikarar ofra okkara tíð uppá, sigst vera farið í søguna.

Vit leikarar hava langt síðan gjørt okkum greitt, at um fótbóltinum skal verða lív lagað í Vágum, so skulu vit hava eitt »Oyggjarlið« í fremstu rød.

Tað er týdningarmikið, at vit hava savnandi kreftir.

Tí fara vit at mæla øllum framburðshugaðum kreftum í oynni at taka saman hendur, so øll oyggin kann gerast stolt av at eiga ein ungdóm,ið tekur kappingina upp við onnur økir í landinum. Vit eru vágamenn úr **FS Vágum**, og tað fara vit at halda fram at vera. Vit bjóða øllum góðum kreftum í oynni at verða við til at skapa uppaftur betri karmar um ítróttina. Tað er ikki spurningurin um, hvat slag av grasi ella á hvørjum stað tað liggur,ið er avgerandi fyri okkum. Vit fara har viljin til framburð er størstur.

Vit leikarar, stuðlaðir av góðum leiðarum, venjarum og áhugaðum stuðlum vilja tí við hesum alment boða frá, at vit standa saman um **»Oyggjarliðið FS Vágar«** bæði nú og í framtíðini.

**Leikararnir**

**Frítíðaravloysarar**
til Miklagarð í SMS

Miklagarður í SMS søkir eftir frítíðaravloysarum at arbeiða frá hálvan juli til og við august 2004.

Arbeiðstíðin er sett til 3/4 tíð. Løn samb. galdandi sáttmála.

Er hetta nakað fyri teg, so ring til Johnny Priess tel 31 30 11

*Miklagarður er størsti matvaruhandil í Føroyum við eini gólvvidd upp á 1700 fermetrar og við meira enn 10000 varunummrum. Í Miklagarði starvast 80 fólk.*

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 30 11

**Hjálparfólk**
til Miklagarð í SMS

Vegna barnburafarloyvi verður søkt eftir fólki til kolonialdeildina í Miklagarði í SMS at byrja 1. juli 2004.

Arbeiðstíðin er sett til 3/4 tíð. Løn samb. galdandi sáttmála.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn til:
Miklagarður, Postboks 1069, 110 Tórshavn,
att: Johnny Priess
**innan 1. juni 2004**

*Miklagarður er størsti matvaruhandil í Føroyum við eini gólvvidd upp á 1700 fermetrar og við meira enn 10000 varunummrum. Í Miklagarði starvast 80 fólk.*

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 30 11